# Arabarar fremri enn føroyingar

**Eitt yvirlit yvir kvinnuliga umboðan í parlamentum runt um í heiminum vísir, at Føroyar liggja í botni. Sjálvt arabiski heimurin, ið ikki júst er kendur fyri javnstøðu ímillum kynini bæði, liggur frammanfyri okkum**



*Tveir av nevndarlimunum í Demokratia, Bergtóra Hanusardóttir, úr Kvinnufelagasamskipan Føroya, og Inga Dahl, sum umboðar Fólkaflokkin í nevndini*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

JAVNSTØÐA
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Við einum kynsbýti upp á 90,4 prosent mannfólk og einans 9,4 prosent konufólk á Føroya Løgtingi hevur demokratiið í Føroyum spælt fallit. Soleiðis stendur at lesa í fororðunum í 82 síðu langa álitinum hjá Demokratia, sum í gjár varð handað BjarnaDjurholm,landsstýrismanni, og sum í dag varð lagt fram á tíðindafundi í Miðlahúsinum í Vágsbotni.

Og at døma út frá hagtølum frá heimsins parlamentum, so stendur illa til her heima við politisku javnstøðuni.

Eitt yvirlit yvir kvinnuliga umboðan í parlamentum runt um í heiminum avdúkar, at sjálvt arabiski heimurin, ið ikki júst er kendur fyri at leggja dent á javnstøðu, liggur frammanfyri Føroyar.

Norðurlond, ið vit vanliga sammeta okkum við, liggja fremst við 41,6 prosentum. Hetta er meiri enn fýra ferðir so nógv sum á Føroya Løgtingi, har bert 9,4 prosent eru kvinnur.

Amerikansku heimspartarnir koma á øðrum plássi, har næstan fimti hvør limur – svarandi til 19,4 prosent – eru kvinnur.

Beint aftanfyri Amerika liggja OECD londini í Evropa, har 19 prosent av tinglimunum eru kvinnur.

Næst á listanum er Afrika við 17 prosentum, Asia við 12,6 prosentum, arabisku statirnir við 9,4 og Føroyar liggja altso niðri á 9,4 prosentum.

## FAKTA

**Yvirlit yvir umboðanina av kvinnum í parlamentum runt heimin:**

| | *Prosent* |
|---|---|
| Norðurlond | 41, 6 |
| Amerika | 19, 4 |
| Evropa (OECD-londini) | 19, 0 |
| Afrika | 17, 0 |
| Suður Asia | 12, 6 |
| Arabisku statirnir | 9, 5 |
| Føroyar | 9, 4 |

*(kelda: www.ipu.org)*

## Betri útlit

Tað er torført at meta um úrslitið av nevndararbeiðinum, men reaktiónirnar frá politisku flokkunum hava sum heild verið positivar, skrivar Demokratia í álitinum og kemur við hesi staðfesting: »Fleiri flokkar hava meldað alment út, at teir ætla at syrgja fyri javnstøðu á uppstillingarlistunum – fleiri flokkar hava praktiserað javnstøðu í uppstillingini í sambandi við fólkatingsvalið 13. november 2007 – ttveir flokkar hava meldað alment út, at teir í framtíðini ætla at tryggja javnstøðu í landsstýrinum – fleiri flokkar eru byrjaðir at arbeiða við javnstøðustrategi innanfloks – ein flokkur hevur lagt uppkot á ting um, at Demokratia skal halda fram við virksemi sínum í 2008. Uppskotið varð samtykt 20. november 2007.«

Víðari skrivar Demokratia: »Eitt mátbært úrslit kann av góðum grundum tó ikki síggjast, fyrr enn løgtingsvalið hevur verið í januar 2008 og kommunuvalið í heyst 2008. Tó metir nevndin, at fólkatingsvalið 13. november 2007 kann síggjast sum eitt parametur fyri hugburðsbroyting viðvíkjandi kvinnuumboðan í politikki, bæði hjá politisku flokkunum og hjá veljarunum – sjálvt um úrslitini ikki beinleiðis kunnu flytast yvir á eitt løgtingsval. Tað er heldur ikki lætt at meta um, hvussu umfatandi ávirkanin av Føroyum sum eitt valdømi fer at hava á valúrslitið hjá teimum kvinnuligu valevnunum. Sambært altjóða gransking tykist møguleikin tó at vera øktur við einum valdømi.«

# Fjølmiðlar dyrka keðiligar søgur

**Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum heldur, at fjølmiðlar lýsa søgur grunt uttan at seta seg nóg væl inn í tingini. Hetta sigur hann í samband við greinarnar hjá Sosialinum um órøkt á serskúlum. Hann harmast tó støðuna á Skúlanum á Trøðni og Rásini í Runavík**



SERSKÚLAR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin er sera harmur at hoyra, at støðan á skúlanum á Trøðni er so vánalig, sum hon verður lýst í Sosialinum. Eisini harmast hann um støðuna inni á Rásini í Saltangará, men hetta verður umvælt beinanvegin, soleiðis at næmingarnir sleppa aftur í skúlan eftir nýggjár, sigur hann.

- Eg skilji væl, at foreldur verða kedd, tá umstøðurnar ikki eru nóg góðar, og at tey nýta fjølmiðlarnar at skunda undir málini, tí tað er trupult at vera foreldur at brekaðum barni.

*- Eg visti ikki, at tað var so galið við lekum á skúlanum, og eg trúði, at umvælingin av hylunum var komin longri, sigur landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni*

Jógvan á Lakjuni viðgongur, at viðlíkahald av almennum bygningum hevur havt eitt eftirsleip líka síðani kreppuna.

- Eg visti ikki, at tað var so galið við lekum á skúlanum, og eg trúði, at umvælingin av hylunum var komin longri. Men stovnsleiðarar hava til uppgávu at peika á, hvørjir tørvir eru, og í flestu førum verða ynskir uppfylt, sigur landsstýrismaðurin.

### Populistiskir fjølmiðlar

Men Jógvan á Lakjuni heldur, at fjølmiðlarnir eiga eisini at síggja ta stóru myndina og ikki bara lýsa sorgarsøgurnar. Støðan er ikki altíð so einføld, sum hon verður lýst, sigur lansstýrismaðurin.

Hann gleðist um tað, sum er hent á økinum, meðan hann hevur verið landsstýrismaður. Nýggj lóg er gjørd fyri skúlan á Trøðni, og skúlinerskildurfrásernámsdeplinum og skal bara taka sær av børnum við heilt serligum tørvi.

Starvsfólkini eru glað fyri hesar broytingar, men tørvur er á fleiri lærarum, og arbeitt verður við hesum. Og farið er undir at leingja eina av lonunum á skúlanum, soleiðis at autistarnir fáa betri umstøður.

Haraftrat er játtanin til tað sernámsfrøðiliga økið økt við umleið 10 mió. hetta valskeiðið, og millum annað verða sernámsfrøðiligar tænastueindir ella NSR-tænasstur skipaðar kring landið.

Tí heldur landsstýrismaðurin, at tað er púra burturvið at føra fram, at samgongan bara hevur raðfest hørð virði. Hann sigur, at neyvan hevur nøkur samgonga raðfest skúla og almanna- og heilsuverk hægri enn henda samgongan.